


# Oljuleiting gevur 22 milliónir í landskassan

**Jan Müller**

13.12.2013 - 10:11

Oljan.fo

Hóast oljan enn ikki er funnin í Føroyum, so gevur leitingin eftir olju og gassi fitt av peningi í føroyska landskassan. Í 2013 hevur landskassin fingið 21,6 mió. kr. fyri víddargjøld frá oljuloyvum og er hetta met eitt einstakt ár sigur Jarðfeingi.

Oljufeløg, ið hava loyvi til leiting eftir kolvetnum, gjalda eitt árligt gjald til landskassan fyri hesi loyvi. Gjaldið verður ásett eftir víddini á loyvunum. Hetta gjald er støðugt fyrstu seks árini av loyvisskeiðnum og hækkar síðani.

Inntøka landskassans frá víddargjøldum er í 2013 21,6 mió. kr. Seinastu fimm árini hevur hon tilsamans verið 75,5 mió. kr.

Í løtuni eru sjey loyvi virkin. Samlaða víddin av loyvunum er 9.788 km², harav tað minsta er 75 km² og tað størsta 3.870 km².

Fyristøðufeløg fyri loyvini eru Statoil og Dong. Hini feløgini, sum eru partur av loyvunum, eru ExxonMobil, OMV og Atlantic Petroleum.

Næsta ár verður farið undir at bora tveir brunnar á hesum leitiloyvunum. Tað er greitt, at tá fara inntøkurnar til landskassan og føroyska samfelagið sum heild at telja hundraðtals milliónir kr.

Oljuboringarnar næsta ár verða størsta íløga nakrantíð í føroyskari søgu og fara helst at tátta í 1,5 til 2 mia. kr., tá avtornar.

| 2010 | 2011 | 2012 |
| --- | --- | --- |
| 11,9 | 14,1 | 16,6 |